# Ingálvur av Reyni er farin

Ingálvi av Reyni førdi føroysku myndlistina inn í 20. øld, tá ið hann loysti romantiska og impressionistiska landslagið sundur og setti abstrakta málningin inn í føroyska list. Hann beindi fyri óneyðugum staklutum í motivinum til tess at snið og litir stóðu eftir í eini livandi, væl tilrættalagdari heild. Virðing og eyðmýkt hansara fyri listini eru eyðkend. Hann sóknaðist støðugt eftir tí listaliga, sum ikki var givið frammanundan, men sum hann sá sum ein møguleika í hvørji einstakari mynd.



Ingálvur av Reyni var ein av størstu koloristunum í norðurlendskari modernismu. Litirnar og kynstrið at nýta teir hevur hann tamt og ment gjøgnum eitt langt og ríkt málaralív. Hann var bæði valørmálari og spektralmálari. Hann valdi litirnir eftir ávísum virðum, og myndir hansara vóru ikki svartar og gráar burturav, sum ofta hevur verið at hoyrt. Tvørturímóti. Í myndum hansara eru nógvir reinir litir, eitt nú reytt kann vera fremst í myndini við svørtum í bakgrundini ella øvugt. Tað svarta er heldur ikki bara svart. Tað er aloftast tónað við grønum, reyðum, bláum ella gulum.

Í filminum Svartur sannleiki greiddi Ingálvur frá arbeiðskreddu síni: Hann tordi ikki rættiliga tað, sum hann skuldi tora, og hvør einasta mynd var ein leitan eftir møguleikanum fyri, at hon kundi gerast ein málningur. Viðhvørt eydnaðist tað, helt hann sjálvur - mong, sum njóta at hyggja at myndum hansara, halda óivað at tað hendi eitt sindur oftari!

Myndirnar hjá Ingálvi hava aloftast ein figurativan kjarna, sum myndaheitið lýsir. Heiti sum “Miðvágur”, “Landslag”, “Kvinna”, “Trolaradekk” og “Bygd” ganga ímillum mynd og áskoðara, heitini benda á, hvar motivið er at finna. Í fyrstu atløgu tykjast eitt nú myndir sum tann myrka “Trolaradekk” og tann ljósa Kompositión” at vera sera ymiskar, men tær eru í roynd og veru rættiliga líkar, um hugt verður nærri at uppbygginini og rútmuni í skapum og linjum.

Seinni hava málningarnir ofta skaldsligar røtur, lýsa yrkingar og eru ekfrasur. “Tey blindu” er málað eftir yrkingini “Hitt blinda liðið” hjá Chr. Matras. Høvuðsverkið “Tey ganga á vegnum og bíða” er somuleiðis ein ekfrasa við støði í Prædikaranum í Gamla testamenti. Allir málningarnir á framsýningini í Listasavni Føroya í 2000 vóru slíkar ekfrasur eftir yrkingar hjá J. H. O. Djurhuus.

Hesi seinnu árini hevur Ingálvur av Reyni málað vatnlitsmyndir. Eisini í teimum síggjast eyðkendu kompositiónskynstur, litaval og spontanitetur hansara. Ingálvur av Reyni hevur havt ein týðandi leiklut í listaumhvørvinum sum slóðari og fastur miðdepil, sum yngri listafólk bæði hava til fyrimynd og stríðast fyri at slíta seg frá og finna nýggjar leiðir.

Umframt sum málara kendu vit Ingálv sum teknara, sangara og ikki at gloyma sum ein mann, ið altíð vísti virðing sína fyri næstanum. Bíðitíð Ingálvs er liðin - vit minnast hann við takksemi.

**Listafelag Føroya**



# Evnisdagur um Lean-leiðslu

**Størri framleidni og betri nøgdsemi eru millum endamálini í Lean-leiðslu. Mánadagin skipaði Synergi fyri tema-degi um evnið**

LEAN-LEIÐSLA
*tíðindaskriv*

Fyrr var tað mest í ídnaðinum, vit hoyrdu um Leanleiðslu, men seinnu tíðina er hugtakið flutt alt meira yvir á umsitingar- og tænastuøkið. í Føroyum hava vit ikki hoyrt so nógv til Lean enn, men í Danmark hevur hugtakið verið frammi í eina tíð, og fleiri stórar fyritøkur hava eisini nýtt hetta aktivt í framleiðslu síni. Tað sigst at 3 av 5 ídnaðarfyritøkum arbeiða við Lean-leiðslu og at Lean-bylgjan nú eisini rakar økir sum fíggjar- og heilsusektorin, byggivinnuna, útbúgvingarøki og alla almennu fyrisitingina.

## Hvat er Lean

Lean merkir »trimma« og snýr hetta seg um at skapa meira virði við minni orku. Vit kundu eisini sagt, at tað stutt sagt handlar um at økja um framleiðsluna og nøgdsemi hjá kundum/viðskiftafólki við at sleppa sær undan spilli av einhvørjum slagi. Hugtakið Lean er uppfunnið av granskarunum Jim Womack og Daniel Jones. Teir settu sær fyri at kanna, hvussu tað bar til, at Toyota framleiddi bilar nógv bíligari enn teirra kappingarneytar. Teir funnu útav, at Toyota brúkti eina skipan, har fokus varð sett á at minimera spill. Av hesi orsøk valdu teir navnið Lean, sum merkir »trimma«.

## Nógvar management bylgjur gjøgnum tíðina

Nógvar ymiskar management bylgjur hava verið frammi í tíðini. Flestu av hesum management bylgjum eru grundaðar á fleiri ára royndir, sum hava givið góð úrslit. Góð amboð og góðar mannagongdir, sum so er vorðið til eitt koncept. Eitt nú TQM-bylgjan, Just in timebylgjan og nú Lean-bylgjan. Vit hava alla tíðina brúk fyri nýggjum amboðum, sum hjálpa okkum at gerast betri til bæði hetta og hitt, so tað er bert gott, tá nýggj amboð stinga seg upp. Men fleiri av hesum bylgjum hava tað við at detta niðurfyri aftur. Flestu av hesum bylgjum hava havt ein góðan boðskap og høvdu verið góðar, um tað vóru implementeraðar í fyritøkurnar á rættan hátt.

Skal Lean eydnast til fulnar, er tað umráðandi at gera tingini á rættan hátt og ikki bara hálvt.

## Framleiðslan kann økjast við 50%

Møguleikarnir við Lean eru øgiligir, sigur Mikkel Eriksen frá konsulentfyritøkuni Valcon. Tað hevur víst seg, at tað er møguligt millum mangt annað at økja um framleiðsluna við 50%, at minka um goymslurnar við 30%, at stytta munandi um saksviðgerðartíðina soleiðis at virði hjá bæði fyritøkuni, kundunum og starvsfólkunum økist munandi. Málið við Lean er at skapa eina virkismentan millum alt starvsfólkið, har fokus er á at gera leypandi batar. At trúgva uppá, at tað altíð

Somuleiðis kunnu skilbøtanir kosta uppsagnir av starvsfólkum. Eitt nú hevur Post Danmark minkað munandi um starvsfólkatalið, m.a. tí at fleiri deildir eru niðurlagdar. Hjá Ledernes Hovedorganisatión hinvegin, siga tey, at tey mest sum sloppu undan uppsagnum, í staðin vóru eingi nýggj fólk sett í starv, tá fólk fóru úr starvi. Ledernes Hovedorganisation hevði sum mál at økja um framleidnið við 20%, men hetta øktist við 50%.

Nú hava føroyskar fyritøkur og stovnar møguleika at vita, um Lean-leiðsa er nakað fyri tey ella um hetta er enn ein døgnfluga. Synergi skipar fyri temadegi um Lean-leiðslu 28. november. Á temadegnum verða Mikkel Eriksen frá Valcon Management Consultants og Gert Bronton frá Ledernes Hovedorganisation at hoyra.